# Skelkandi vitan um kvinnukor á altjóða ST-degnum

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Øll, sum vóru til tiltakið hjá Javnstøðunevndini og Demokratiu altjóða ST-dagin – leygardagin - mundu sita sum negld, tá Herdis Tórgeirsdóttir úr Íslandi vísti skelkandi tøl um korini hjá kvinnum og gentum í stóru verð. Siti enn við einum beiskum smakki í munninum. Nýtist okkum at vita alt hetta? Sjálvsagt! Um vit vilja broyta nakað, mugu vit kenna veruleikan. Og sannroyndirnar eg her nevni eru veruleikin hjá fleiri milliónatals gentum og kvinnum ymsastaðni í heiminum.

Sannroyndirnar eru millum aðrar hesar:

· Av teimum sum eru svong, eru 7 av 10 kvinnur og gentur

· Kvinnur eiga 1 % av heimsins virðum – hóast tær gera 66% av arbeiðinum

· Nútimans trælahald er kvinnuhandil. Eisini í Íslandi og Danmark – hvussu er her?

· Vandamiklasta stað hjá nógvum kvinnum er í egnum heimi: neyðtøka, harðskapur, siðamisbrot

· Um konurnar eru neyðtiknar, ein so stór skomm í ávísum londum fyri mannin, at hann sleppur úr hjúnarbandinum

· Menn vilja sleppa undan HIV, tí skal gentan teir eru saman við vera jomfrú. Tískil gerast genturnar yngri og yngri sum verða neyðtiknar

**Hvussu hjálpa vit?**

Hvat gera vit í Føroyum við alt hetta? Gott, at vit stuðla barnaheimum í stóru verð og verkætlan um bróstageving í menningarlandi. Men gera vit nóg mikið? Áttu vit ikki at veitt menningarhjálp í nógv størri mun enn vit gera í dag? Vit rinda eina nógv minni upphædd enn nógv onnur lond av bruttotjóðarúrtøkuni – harumframt hava vit eingi flóttarfólk í Føroyum.

**Revsilógin**

Hvussu er við rættartrygdini hjá útlendskum kvinnum, sum koma higar? Hvør hjálpir teimum? Kenna tær sínar skyldur og rættindi? Hava vit nóg góð tilboð til teirra, so tær læra málið?

Vit samtykkja broytingar í donsku revsilógini uttan himpr. Nakað av kjakið um §266 b – tað er jú obligatoriskt! Men veruligt kjak, at fyrihalda seg til serføroysk viðurskifti – hvussu fyribyrgja kvinnuhandli her? Hvussu fyribyrgja vit harðskapi her? Er danska loysnin altíð tann rættasta her hjá okkum?

Um vit ikki bert samtyktu broytingar, í eitt nú donsku revsilógini, men høvdu okkara egnu revsilóg, tá høvdu vit kjakast, sett spurnaðartekin og ment tann lógarkarmin, sum er hin hóskiligasti og skilabesti her hjá okkum, heldur enn bert at at samtykkja allar tær donsku broytingarnar og halda væl standa til.

**Integratión**

Útlendingaøkið skal sambært samgonguskjalinum takast heim um gott eitt ár. Øðiliga lítið – um nakað - hevur verið at hoyrt um hetta mál, nú heimtøkan nærkast av álvara. Alt ov ofta halda vit, at bara vit samtykkja donsku lógirnar, so er væl vorðið. So er ikki – og danski integratiónspolitikkurin er als einki at spegla sær í! Har hava útlendingar verið í ártíggju, sum framvegis hvørki duga málið ella megna at fara til handils sjálvi. Arbeiðssamleikin og sjálvsvirðingin eru knúskað, tí eingin hevur sett krøv ella víst teimum álit. Hvussu ætla VIT at fáa útlendingar, sum koma higar at trívast og mennast í føroyska samfelagnum? Hvussu ætla vit at taka ímóti teimum? Hvørji krøv ætla vit at seta? Hvussu skapa vit teimum virðilig kor? Hvørji krøv og skyldur skulu vera? Hvørji tilboð og krøv í mun til mál, mentan og kunning um føroyska samfelagið?

Vælvitandi at hópurin av útlendskum kvinnum trívast, liva og hava tað gott í føroyska samfelagnum, eru eisini fleiri útlendskar kvinnur, sum á hvøjrum ári fáa hjálp í Kvinnuhúsinum. Tað er ein veruleiki, at allar útlendskar kvinnur ikki liva væl her. Tað mugu vit taka í størsta álvara. Seta orð á og skapa røttu karmarnar. Trupulleikarnir hvørva ikki, um vit lata eyguni aftur fyri teimum. Tvørturímóti.

# Skapar tað vøkstur at loka fyri útlendskari arbeiðsmegi?

BJØRT SAMUELSEN
løgtingskvinna



**Áðrenn lokað verður fyri ES-arbeiðsmegi eigur landsstýrið at siga okkum hvussu tað kemur at raka vinnufyritøkur og um hetta yvirhøvur loysir trupulleikarnar hjá føroysku arbeiðsmegini**

Føroyar vilja hava tættari samstarv við ES-londini. Føroyar vilja hava lut í teimum fýra frælsunum. Men nú verða stórar forðingar lagdar fyri ES-borgarum at koma higar at arbeiða. Henda protektionistiska framferð skapar óstøðugar vinnukarmar, er kappingaravlagandi og kann í seinasta enda forða fyri búskaparvøksti.

Arbeiðsloysið í Føroyum er framvegis er lágt, sammett við flestu onnur lond. Í miðal góð 4 %. Í størsta partinum av landinum liggur tað niðanfyri, meðan tað í Norðuroyggjum í løtuni er á leið 7,5 %, eitt tal sum vónandi minkar nú virksemi aftur verður á Kósini.

Politiska leiðsla landsins eigur sjálvandi at gera alt sum stendur í hennara makt at fyribyrgja vaksandi arbeiðsloysi. Millum annað við at tryggja, at hvør einasta almenn íløgukróna skapar arbeiði til so nógvar hendur sum til ber.

Men skal steingjast fyri arbeiðsmegi frá ES londunum, má trygd vera fyri, at tað ikki skapar fleiri trupulleikar, enn tað tekur burtur. Teir útlendingar, sum hava arbeiðsloyvi, verða ikki sendir til hús. Og tað er lítið sannlíkt, at føroyskir arbeiðsgevarar í stóran mun fara eftir útlendskari arbeiðsmegi, um væl skikkað føroysk arbeiðsmegi er tøk beint uttanfyri dyrnar. Harumframt verður ikki stongt fyri útlendskari arbeiðsmegi. Men tað verður vent aftur til eina sera stirvna og tunga mannagongd.

**Neyðug lóg**

Lógin, sum ger tað smidligt at fáa arbeiðstakarar úr ES-londunum hendan vegin at arbeiða, hevur einans verið í gildi í eitt gott ár.

Báði táverandi vinnu- og fiskivinnumálaráðharrar hjá Tjóðveldi mæltu staðiliga frá at seta eitt lágt mark fyri, nær lógin fór úr aftur gildi, tí hetta útholaði lógina. Aðrastaðni verður 3,5 prosent arbeiðsloysi ikki mett at vera veruligt arbeiðsloysi, hóast tað sjálvandi kennist meint fyri tann, sum er raktur.

Tað var tó bráðneyðugt at fáa lógina setta í gildi tí tørvurin á arbeiðsmegi hevði tá leingi verið sera átrokandi og bremsaði beinleiðis fyri vinnuligum vøkstri. Lógin varð mett at vera ein fyritreyt fyri búskaparvøkstri í Føroyum.

Men avtalan í sambandi við ríkislógartilmælið um at seta lógina um ES-arbeiðsmeg í gildi, var eisini púra greið: At útlendingalóggávan skuldi yvirtakast, so vit sjálvi kunnu umsita hetta fyri okkara arbeiðsmarknað sum týdningarmikla málsøki. Hetta er bakgrundin fyri útlendingastovuni, sum varð sett á stovn og í lógini stendur:

“Arbeitt verður fyri at yvirtaka málsøkið so skjótt sum til ber, og í seinasta lagi í 2009, soleiðis at tað vera føroyskir myndugleikar, ið fáa fulla ábyrgd eins og føroysk lóggáva, ið kemur at vera galdandi á økinum.”

Men hetta er ikki hent. Og einki bendir á, at útlendingalóggávan verður yvirtikin í hesum valskeiðinum.

**Vinnu- og uttanríkispolitikkur ad hoc**

At stongt verður fyri útlendskari arbeiðsmegi merkir ikki, at tað samstundis verður arbeiði til tær tøku hendurnar sum eru. Og skilabetri gerst tað ikki, um tað rakar føroyskar fyritøkur, sum hava tørv á spesifikkari arbeiðsmegi, tær ikki fáa hendur á her heima.

Tí eigur landsstýrið sum eitt minstamark at gera eina kanning av, hvussu hetta kemur at raka føroysku vinnuna, og harvið eisini í seinasta enda føroyska arbeiðstakaran.

Og hvat ætlar landsstýrið í einum langtíðarhøpi? At fáa part í teimum fýra frælsunum – sum merkir fríðan flutning av arbeiðsmegi, vørum, tænastum og kapitali. Trýr ABC-landsstýrið veruliga, at til ber at siga: Jú takk, vit vilja fegin at okkara borgarar fáa fría atgongd til at arbeiða í Evropasamveldinum, men við samstarv meina vit bara við hvørt, altso tá tað einvegis gagnar okkum?

Í løtuni livi eg við eini ófrættakenslu av, at okkara búskapur kann fara í spønir av tilvildarligum vinnu-, arbeiðsmarknaðar- og uttanríkispolitikki, har fá samanhangandi framtíðarperspektiv hómast.

# Bókaframløga hjá Stiðjanum hósdagin

**Hósdagin kl. 10 hevur forlagið Stiðin bókaframløgu í H. N. Jacobsens Bókahandli**

TÍÐINDASKRIV
*Forlagið Stiðin*

Har verður løgd fram bókin “Samskifti við stjórnmálamenn 1964”, sum Zakarias Wang hevur skrivað. Her verður greitt frá, at tá hann skuldi skriva sína serritgerð í stjórnmálafrøði við Universitetið í Århus um viðurskiftini millum løgting og landsstýri undir heimastýrinum, helt professari hansara, Erik Rasmussen, at tað var ov lítið bert at hava rúgvismikið tilfar úr bløðunum um føroyskan politikk at halda seg til, men at Zakarias eisini mátti fáa samskifti í lag við teir menn, sum høvdu verið frammi í føroyska samfelagnum hesi ár. Summar fekst bert fatur í við brævasamskifti, men tað eydnaðist at fáa djúptøknar samrøður við fyrrverandi løgmenninar Kristian Djurhuus og Petur Mohr Dam, sum høvdu nógv áhugavert at siga. Harumframt var bæði samrøða og brævaskifti við Rikard Long, fyrrverandi løgtingsog landsstýrismann, samrøða við Jóhan Petur Davidsen, løgtingsmann og fyrrverandi landsstýrismann, eins og við Erlend Patursson, løgtings- og landsstýrismann. Samrøða var við Trygva Samuelsen og Kjartan Mohr, løgtingsmenn, við J. H. Danbjørg og Jákup í Jákupsstovu, fyrrverandi løgtingsmenn. Harumframt var samrøða við blaðstjóran á Føroyatíðindum, Jens Dam, og nógv brævasamskifti var við teir, sum høvdu við hini bløðini at gera. Edw. Mitens, fyrrverandi landsstýrismaður, gav nógvar skrivligar upplýsingar. Hann var fyrsti skrivstovustjóri hjá landsstýrinum, og long samrøða er eisini við táverandi skrivstovustjóran Johan Djurhuus.

Allar samrøðurnar vórðu skrivaðar og sendar til góðkenningar, so høvi var til at gera broytingar, um nakað var komið skeivt fyri.

Zakarias sigur, at mesta av hesum tilfari hevur ligið í einari mappu, og helt hann at tað var synd um tað forfórst, tí tað er møguligt at onkur kann halda tað í ein ávísan mun kann nýtast sum keldurtilfar til føroysk samfelagsviðurskifti um hetta mundið. Tí hevur hann skrivað bókina og gjørt hana nýtiliga við at hava ein fullfíggjaðan stíl, har tað stendur nær tey fólk, sum nevnd eru í bókini, hava livað.

Teir, samrøðurnar eru við, hava livað tá fólkaatkvøðan var í 1946, og hava nógv at siga um hesa hending. Harumframt er nógv um hvussu samráðingar vóru millum flokkarnar um at skipa landsstýri, og tað var minst líka so spennandi, sum tað kann vera í dag.

Fyri nøkrum árum síðani prentaði Sosialurin tvær av hesum samrøðu, ta við P. M. Dam og ta við Jóhan Petur Davidsen. Henda seinna vakti mikla øsing, men nú ber til hjá øllum at gera sínar metingar um hvørt nøkur orsøk var til hana.

Harumframt verður nýggj útgáva av tí kendu bókini eftir Petter Dass, Norðlandslúðurin, løgd fram. Tað er Axel Tórgarð, sum hevur týtt hana til føroyskt, og er hon sera løtt og áhugaverd at lesa, og er alt í henni so heimligt fyri okkum føroyingar.

Forlagið hevur eisini givið út eina byrjunarbók fyri tey, sum hava hug at læra seg latín. Hon eitur Fabula og er týdd úr donskum. Høvundurin er av føroyskari ætt bæði í kall- og kvennlegg. Hon eitur Tove Niclasen, og okkara kendi týðari úr Kunoy, Bjarni Niclasen, var abbabeiggi hennara. Bókin hevur staðið sína roynd bæði í tí føroyska og danska skúlaverkinum, og verður nú at fáa í bókabúðunum.